# Tøkkir & heilsanir





**Mín høgt elskaða dóttir**
Hjartaliga tillukku á tvey ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína ynskir babba.
Ein heilsan frá langommu og langabba í Klaksvík-



**Góða Olivia!**
Hjartaliga tillukku á konfirmatiónsdegnum 1. mai og øll góð ynski fyri framtíðina frá
ommu og abba



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymsan hátt vóru við til at gera fermingardag mín, tann 10.10.10, so hugnaligan og minnisríkan.
**Andrias Dahl Joensen**




ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

## Fulltrúi til Heilsumálaráðið

Eitt farloyvisstarv, sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum, er leyst at søkja í tíðarskeiðinum 1. juni 2011 til 31. mai 2012.

Sum fulltrúi Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar m.a., at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á heilsuøkinum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum, og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Heilsumálaráðnum. Uppgávurnar eru áhugaverdar og fjølbroyttar. Talan er um starv í einum spennandi politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti.

**Førleikar**
Tú hevur samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. løgfrøðingur, stjórnmálafrøðingur, ella búskaparfrøðingur. Lesandi, sum eru um at gera útbúgving sína lidna, eru eisini vælkomin at søkja starvið. Tú skalt duga væl at orða teg á føroyskum, bæði í skrift og í talu, og er tað ein fyrimunur, um tú hevur politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum sum heild.

Starvið er mennandi og við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Hóast starvið er sjálvstøðugt, og ábyrgdin stór, so verða uppgávurnar loystar í samstarvi við aðrar starvsfelagar í ráðnum, eins og saman við leiðandi løgfrøðinginum í ráðnum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. mai kl. 12:00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, tlf. 30 40 50 og poul.geert.hansen@hmr.fo

Heilsumálaráðið umsitur heilsumál, herundir sjúkrahúsverkið, apoteksverkið og primeru heilsutænastuna, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ • EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO